## Fabregas er serligur

Hóast teir hava roynt, so hevur tað enn ikki eydnast Barcelona at keypa Cesc Fabregas frá Arsenal, sum higar til hevur takkað nei til tær £30 milliónirnar, sum Barcelona er til reiðar at gjalda. Arsene Wenger í Arsenal hevur havt hug at ilskast inn á Barcelona, men har sigur forsetin, Joan Laporta, at Wenger veit av, at Fabregas er nakað serligt. – Hann er ein catalanskur spælari, sum hevur spælt við okkum øll ungdómsárini, og tí er tað eyðsæð, at vit vilja hava hann aftur, sigur Laporta.




## Útbúgva fótbóltsleiðarar

Farið verður nú aftur undir ítróttarleiðararútbúgvingina hjá FSF. Høvuðendamálini við útbúgvingini eru at útvega leiðarunum í føroysku fótbóltsfeløgunum eina leiðaraútbúgving og at styrkja føroysku fótbóltsfeløgini innanhýsis. Fótbóltssambandið skipar fyri fyrsta modulinum (Virkisfatan) í ítróttarleiðaraútbúgvingini 23. og 24. oktober. Fyrsta modulið, sum er 15 tímar tilsamans, verður hildið í FSF-húsinum. Í alt verður skipað fyri 4 modulum í leiðaraútbúgvingini komandi hálva árið.

HB – Víkingur 1-1 (1-0):

# Spurningurin er bara nær



Súni Olsen og Víkingur vunnu seg aftur á beint, tá tað í Gundadali eydnaðist at fáa javnleik móti oddaliðnum, HB

Mynd: Álvur Haraldsen

HB

Víkingur

**Í elsta høvuðsstaðarfelagnum verður einans bíða eftir, at føroyameistaraheitið verður tryggjað. Eina stigið í Gundadali í gjár førdi liðið eitt stig nærri gullinum**




Uni Holm Johannesen

Í HB-húsinum spyrja tey ikki longur, um felagið fer at vinna føroyameistaraheitið í 2009. Spurningurin er bara nær.

HB tók í gjár aftur eitt fet móti gullmerkinum. Hóast liðið ikki fekk fult á heimavølli móti Víkingi, so nærkast 20. føroyameistaraheitið í søgu felagsins í hvørjum.

### Landsliðsstøðið

Rógvi Poulsen legði heimaliðið á odda, tá lítil løta restaði í av fyrra hálvleiki. Andrew av Fløtum sendi argjamannin avstað við frálíkari sending, og einsamallur við málverjan var Poulsen tryggur.

Málið prógvaði nakrar av eginleikunum hjá honum. Hann hevur eygað fyri spælinum, kvikur og búgvin. Tað hevur hann víst fleiri ferðir í hesum kappingarárinum, og hann hevur verið millum teir mest eyðsýndu á liðnum hjá komandi føroyameistarunum.

Brian Olsen, Levi Hanssen, Johan Ejvind Mouritsen, Palli Augustinussen, Jóan Símun Edmundsson, Høgni Zachariassen eru millum teirra, sum Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevur hugt nærri at í landsliðshøpi seinastu mánaðirnar. Tað hevði verið løgið, um Rógvi Poulsen ikki fekk møguleikan skjótt.

### Lítið at bjóða

Dysturin í Gundadali var lítið undirhaldandi. Víkingur var sera ansi í fyrra umfarinum, og legði ikki serliga nógv fyri í framrættaða spælinum. Tað eydnaðist gestunum at fáa heimaliðið niður í ferð og at steðga einstaklingunum. Bestu royndina hjá Víkingi stóð Súni Olsen fyri. Miðvallarin royndi seg við beinleiðis frísparki, men Marcin Dawid vardi væl.

Sølvi Vatnhamar javnaði fyri Víkingi, tá ein tími var leiktur av dystinum. Miðvallarin tók av, tá Hans á Lag og Marcin David ikki kundu semjast um, hvør skuldi senda bóltin burtur av vandaleið. Stutt frammanundan hevði Andrew av Fløtum sent í stólpan.

### Misnýttu brotsspark

Andrew av Fløtum hevði gyltan møguleika at skjóta HB á sigurskós aftur longu tveir minuttir seinni. Rógvi Poulsen varð rendur um koll í brotsteiginum, og dómarin ivaðist ikki. Brotsspark. Gestirnir vóru sera argir um dómin, og mótmæltu harðliga. Og tað høvdu teir allan rættin til. Talan var um eitt sera ivasamt brotsspark.

Úr ellivu metrum misnýtti framherjin tó. Geza Turi tveitti seg og vardi lættliga fyri skotinum.

Víkingur vildi ikki tveita stigið fyri borð, og dúvaði ikki beinleiðis at tryggja sær øll stigini. Uppspælið var at senda langar bóltar úr verjupartinum móti framherjunum, men tað gav ikki heimaliðnum trupulleikar. Hinvegin eydnaðist tað eisini at verja fyri atsóknunum hjá HB.

### Komandi føroyameistarar

HB hevur beina kós móti gullinum. Um EB/Streymur, sum spælur í kvøld, bara fær eitt stig burtur úr komandi tveimum dystunum, og HB vinnur á grannunum úr B36 næstuferð, er FM-heitið tryggjað. So lítið restar í.

Víkingur fekk lítla uppreisn í gjár. Liðið hevði undan dystinum tapt tríggjar ferðir upp í slag. Og eitt stig á útivølli móti oddaliðnum má metast sum nøktandi.

Við steypasigrinum á ólavsøku hevur Víkingu tryggjað sær sína fyrstu luttøku í evropeiskum fótbólti. Framvegis er møguleiki fyri at vinna heiðursmerki, men málið fyri 2009 er longu rokkið.

## Gundadalur sæð betri dagar

- Gundadalur var í øllum førum ikki karmur um sín besta dyst í gjár.

Tað staðfestir Páll Mohr Joensen. Hann vísir á, at liðini ikki leiktu serliga væl og leikferðin var sum heild lág.

- Hóast vit eru á odda í hálvleikinum, eru vit ikki nøgdir. Vit hava ov lítið hugflog og geva teimum ov nógv pláss at spæla á, sigur Joensen.

Andrew av Fløtum misnýtti úr ellivu metrum í gjár. Summi vildu verða við, at talan var um eitt sera ivasamt brotsspark, og tí vann rættvísið, tá Geza Turi vardi fyri skotinum.

- Fólk kunnu kjakast um dómin. Eg hevði í øllum førum verði argur, um brotssparkið varð dømt móti okkum, sigur Páll Mohr Joensen.

*- uni*

## Ikki nøgdur við vøllin

Víkingur stendur seg oftast væl í Gundadali. Liðið hevur fingið fýra stig av nýggju møguligum á útivølli móti høvuðsstaðarfeløgunum. Atli Gregersen metir, at graslíkið í Gundadali eru væl betri enn í Sarpugerði.

– Kommunan hevur givið okkum fantastiskar umstøður kring vøllin, og fólkið um felagið ger eitt megnar arbeiði. Men um tað ikki regnar og vøllurin er vátur, er torført at spæla bólt. Og tað er harmiligt, tí vit hava fleiri frálíkar fótbóltsleikarar. Tá berjast vit meira, flennir Atli Gregersen.

- Tað er torført at seta orð á mínar kenslur. Eitt stig í Gundadali er frálíkt. Og vit eiga at vera nøgdir. Men vit harmast um og eru vónbrotnir um, at vit ikki fingu øll trý.

Tað sigur Atli Gregersen, sum stóð seg væl í miðverjuni hjá Víkingi í gjár. Hann greiðir frá, at liðið ofta reisist aftur, tá torførir dystir eru á skránni.

- Undan dystinum høvdu vit tapt tríggjar ferðir upp í slag. Men eg ivaðist ikki í, at vit fóru at fáa stig í Gundadali, sigur Gregersen.

Hvør er tín viðmerking til brotssparkið, sum varð dømt móti Rógva Poulsen?

- Vit síggja tílíkar støður úr fleiri sjónarhornum. Í løtuni, tá hann varð feldur, skilti eg als ikki, hvar Dagfinn Olsen, dómari, fann hatta brotssparkið. Men møguliga vísir sjónvarpsupptøkurnar eitt annað. Vit mótmæltu harðliga, men tú hugsar ikki klárt í tílíkum støðum, tí pulsurin er langt uppi. Men Andrew av Fløtum vísti fair play, tá hann misnýtti, greiðir Atli Gregersen flennandi frá.

*- uni*